VÍF-Kyndil:37-28 (20-15):

# Klassiskur stórsigur

**VÍF snøgt sagt hølvaði Kyndil av, tá stóri klassikarin í føroyskum manshondbólti var á skránni mikukvøldið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Kyndil hevði til dystin fingið Jónleif Sólsker inn aftur í hópin, men heldur ikki hetta hjálpti móti einum væl tendraðum VÍF-liði*

Tað var rættiliga lagt upp til stórdyst í Vestmanna mikukvøldið. Kyndil kom á vitjan, og tó at hesir dystirnir ikki hava havt sama undirhaldsvirðið tey bæði seinastu árini, sum teir oftani hava havt, so tóktist vend vera komin í í so máta. Vestmenningar tykjast ikki hava somu styrki í ár, sum teir hava havt, meðan Kyndil hinvegin rættiliga hevur riggað til, so alt í alt skuldu útlitini fyri einum sera spennandi dysti so avgjørt verið til staðar.

### Spenningurin reyk

Tað var tó skjótt, at stórur partur av hesum spenninginum hvarv. Eftir eina hampuliga javna byrjan, har liðini bæði royndu at finna stevið, var tað nevnliga VÍF, sum brádliga byrjaði at draga frá, og hetta hevði sína avgjørdu orsøkir.

Meðan VÍF hampuliga skjótt fekk takið í álopsspælinum hjá Kyndli, sum í stóran mun varð miðsavnað um strikuspælið hesa fyrstu løtuna, so megnaði verjan hjá teimum grønu snøgt sagt ikki at koma inn í dystin. Onkursvegna tóktust leikararnir hava ta fatan – hóast tað neyvan var taktiska uppleggið - at skilabest mundi vera at standa inni og bíða. Og við skjúttum sum eitt nú Inga og Áka Olsen umframt Piti Negru, so gest hetta ikki órevsað. Serliga Ingi tóktist vera væl fyri, og tað var mest sum eftir vild, at málini fuku úr hondum hansara uttan nakran livandi møguleika hjá hvørki Lars Black ella Johan Danielsen at bjarga.

### Hóttu við sorli

Eitt var, at verjuspælið hja Kyndli ikki koyrdi. Liðið hevur kanska ikki tí sterkastu verjuna í landinum, og tí er tað kanska ikki so ofta her, at teirra dystir verða vunnir. Men so hvørt sum dystirin leið, so gjørdist eisini greitt, at heldur ikki í álopspartinum var nóg gott skil á. Tað kann annars tykjast merkisvert, tá liðið telir fleiri av bestu álopsmonnunum í landinum, men sæð burtur frá innspælingunum fyrstu tíðina, so var tað merkisvert, at Kyndil somikið sjáldan megnaði at spæla tunt í álopspartinum. Heldur ikki tá Vestmenningar vóru bæði ein og tveir í undirtali tóktist hetta á nakran hátt at bila, tí bólturin varð aloftast førdur alt ov seint runt.

Skilið var á leið hitt sama eftir steðgin. Eina løtu fann Eli Müller í VÍF málinum eisini stórspælið fram, og nú hóttu vestmenningar við einum veruligum sorli. Snøgt sagt alt tóktist bera til móti einum mátt- og mótleysum kyndilsliðið, og var tað ikki fyri tað sannroynd, at teir seinatu løtuna royndu seg við ymsum snildum, so hevði VÍF uttan iva vunnið dystin við enn størri muni enn teimum níggju, sum talan varð um.

Fyri VÍF var dysturin fyrst og fremst ein staðfesting av, at teir framvegis eru týðandi partur í oddastríðnum. Ein partur, sum roknast skal við, og har leikararnir veruliga vilja ofra seg fyri hvørjum øðrum. Serliga var hetta sjónligt í fyrra hálvleiki, har liðið fekk seks av sínum sjey útvísingunum, men har hinir á vøllinum afturfyri stríddust tað meira. Verður hugburðurin hjá leikarunum tann sami til komandi nógvu dystirnar, so er einki at ivast í, at liðið aftur í ár fer at hoyra til har, sum teir sjálvir halda seg hoyra heima. Tað er uttan iva dyggur smeitur, at Sámal ikki verður við aftur í ár, men hinvegin verður fjallaklintrarin, Johnny Joensen, helst skjótt aftur at síggja, og vestmenningar hava áður sýnt, at teir megna at standa seg, hóast týðandi leikarar sita uttanfyri.

Júst hugburðurin tykist hinvegin vera nakað, sum teir í Kyndli av álvara skulu arbeiða við. Liðið hevur í ár víst, at teir væl megna at spæla sum besta lið í landinum, men hinvegin hava avrikini aðrar tíðir verið merkt av líkasælu og kanska eisini ræðslu fyri mótstøðumonnunum.

Til hendan dystin hevði kiðið annars styrkt seg við Jónleifi Sólsker, sum eftir øllum at døma hevur útsett ætlanirnar um eina pensionisttilveru á øðrum liði. Í longdini kann hetta væl vísa seg suim ein góður styrkur, tí Jónleif kann bæði avlasta Jakob Jónsson í miðspælinum, umframt at hann dugir at halda ungu leikarunum til. Men skal liðið vera við í oddinum, so krevst nógv meira støðufesti. Leikarar sum eitt nú Høgni Klein og Finnur Hansson sýna ov sjáldan, at teir eru millum teir bestu í landinum, eisini tá tað gongur ímóti, og so noyðast leikararnir eisini at hugsa meira um verjupartin, skulu teir gera sær vónir um at toga seg longur uppeftir.

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 5 | 5 - 0 - 0 | 122 | 99 | 23 | 10 |
| 2 | VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 117 | 104 | 13 | 6 |
| 3 | StÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 126 | 127 | -1 | 6 |
| 4 | Neistin | 6 | 2 - 1 - 3 | 116 | 122 | -6 | 5 |
| 5 | Kyndil | 5 | 2 - 0 - 3 | 132 | 123 | 9 | 4 |
| 6 | Stjørnan | 5 | 1 - 1 - 3 | 96 | 105 | -9 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 1 - 0 - 4 | 102 | 131 | -29 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 186 | 152 | 34 | 8 |
| 2 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 168 | 150 | 18 | 8 |
| 3 | StÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 148 | 131 | 17 | 8 |
| 4 | Kyndil | 5 | 3 - 0 - 2 | 146 | 136 | 10 | 6 |
| 5 | KÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 122 | 122 | 0 | 4 |
| 6 | H71 | 5 | 2 - 0 - 3 | 115 | 132 | -17 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 6 | 0 - 0 - 6 | 140 | 202 | -62 | 0 |

### Dysturin í tølum

**VÍF-Kyndil 37-28 (20-15)**

Málskjúttar:
VÍF: Ingi Olsen 12, Áki Olsen 10(2), Áki G. Olsen 6, John Zachariasen 4, Daniel Rápa 2, Eli Müller 1(1), Agnar Joensen 1, Piti Negru 1
Kyndil: Jacob Jónsson 7(3), Finnur Hansson 5(1), Hans Áki Dal-Christiansen 5(2), Jónleif Sólsker 3(2), Janus Einar Sørensen 3, Regin Johannesen 2, Heini Bendtsen 2, Rúni Mohr 1
Brotskøst: VÍF 4, Kyndil 10
Útvísingar: VÍF 7, Kyndil 3
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen: Vestmenningum dámdu lítið hørðu linjuna fyrstu løtuna, men tá leikararnir høvdu rættað seg til eftir hesari, so tóktist dysturin glíða uttan teir heilt stóru trupulleikarnar.



StÍF-Neistin 28-27 (13-11):

# Í evstu løtu



*Hóast StÍF heilt leingi hevði heilt gott tak á Neistanum, so gjørdust seinastu minuttirnir nakað væl meira spennandi, enn teir á heimaliðnum høvdu ætlað*

**Eftir at strandingar tóktust stinnari í 50 minuttir, glepsaði Neistin av álvara, men hóast teir bæði høvdu eitt og tvey stig í eygsjón, so brast vónin, tá Andre F. Danielsen skoraði fýra sekund fyri leiklok**

MANDSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Oddadystur var á Skála, tá Neistin kom á vitjan. Kanska heldur óvæntað má sigast, tí undan árinum tóktist málið hjá Neistanum fyrst og fremst vera at byggja eitt nýtt lið upp. Eitt nýtt lið, sum higartil hevur prógvað, at evnini eru til staðar, og sum við einum ókøvandi stríðsvilja hevur savnað hópin av stigum saman.

### Sama uppskriftin

At strandingar skuldu vera við frammi í oddinum, var hinvegin kanska meira væntandi. Seinastu mongu árini hevur liðið staðið fyri nakað av tí mest undirhaldandi hondbóltinum í landinum, og í løtum av dystinum mikukvøldið sást eisini hví.

Við góðum verjuspælið megnaðu teir í løtum at halda teimum bláu frá at skora, og tá møguleikin til kontra so beyðst, gekk tað skjótt fyri seg. Við ferð varð bólturin førdur niðan eftir vøllinum, soleiðis at Neista-verjan ongan møguleika hevði at koma upp á pláss.

Meginpartin av dystinum var tað eisini so, at StÍF hevði tamarhald á tí, sum gekk fyri seg. Karí Mortensen og Áki Mørk royndu onkun tíð at muta nakað ímóti av bakk-plássunum, men hóast hesir eisini fingu góða úrtøku burtur úr gjøgnumbrotsroyndunum, so megnaðu teir ikki einsamallir at fanga StÍF. Mest sum hvørja ferð munurin hevði hug at minka, settu teir á heimaliðnum meira ferð á, soleiðis at uppgávan aftur tóktist vónleys hjá Neistanum.

### Øgiligur endi

Soleiðis sá eisin út tíggju minuttir fyri leiklok. Neisti hevði enn einaferð gjørt eitt sprell, har teir minkaðu munin úr fimm niður í eitt mál, men so svaraði StÍF aftur. Fýra mál vóru á muni, og so mundu flestu áskoðararnir kenna seg vísar í, at stigini vórðu verandi á Skála.

Kanska hildu leikararnir á heimaliðnum eisini, at so var, men teir høvdu gloymt stríðsviljan hjá Neistanum. Við einum øgiligum taki og fimm málum á rað syrgdu teir brádliga fyri, at teir fyri fyrstu ferð í dystinum vóru á odda, og so fór áskoðarafjøldin av álvara í kók.

Tað eydnaðist StÍF at berja seg fram um aftur, men trýstið gjørdist ov stórt. Tvær reisur á rað mistu teir bóltin í álopspartinum, og í sínum seinasta álopi eydnaðist Neistanum at fáa brotskast. Við tíggju sekundum eftir sendi Morgan Knezevic hetta í meskarnar, men StÍF fall kortini ikki í ´fátt.

Snøgt sagt, so funnu teir seg ikki í, at annars vísi sigurin skuldi gleppa teimum av hondum, men runnu ístaðin beint í álop, og hetta tóktist eisini geva úrslit, tá Alexander varð spældur up til skot. Í øllum førum ivaðust strandingar ikki í, at teir skuldu fáa brotskast, tí Neistin hevði vart innanfyri, men hetta mettu dómararnir ikki, og ístaðin vórðu tríggir metrar dømdir. Og so kundi tað gera tað sama, hvat leikarar og áskoðarar hildu um hetta, tí dómurin stóð sjálvandi við.

Tað eydnaðist tó at fáa úrtøku burturúr hesum. Neistin valdi at ansa eftir Sveini Justinussen, og ístaðin kundi Artur spæla André leysan, og við seinasta skotinum í dystinum tveitti hann bóltin í meskarnar.

### Imponerandi veteranur

Avgerandi skotið frá André hevur við sær, at støðan í oddinum nú er mest sum púrasta jøvn. Trý lið hava nú átta stig hvør, men strandingar hava tó tann fyrimunin, at teir hava leikt ein dyst færri enn hini.

Við spælinum, sum teir hava sýnt higartil, so er heldur ikki óhugsandi, at StÍF í øllum førum fara at gerast drúgvir í endaspælinum, men akkurát, hvussu langt hetta røkkur, er kanska dekan ov tíðliga at siga longu nú.

Neistin hevur longu nú prógvað, at liðið kann røkka langt, og aftur á Skála sýndu teir, hvussu langt stríðsviljin kann røkka. Við stórspælinum, sum Kári Mortensen sýndi á bakkinum, hevur liðið helst eisini fingið ein munandi styrk, og so kann føðibræv vera føðibræv. Er leikarin nóg góður, so eigur hann at vera við, so tað skuldi verið løgið, um Karí Mortensen ikki eisini er við á liðnum framyvir.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Neistin 28-27 (13-11)**

Málskjúttar:
StÍF: Costin Dumitrescu 8, Sveinur Justinussen 7(1), Andre F. Danielsen 6, Bent Djurhuus 2, Janus Trúgvason 2, Kristian Petursson 1, Alexandur Johansen 1, Artur Johansen 1(1)
Neistin: Kári Mortensen 7, Morgan Knezevic 6(2), Áki Mørk 4(1), Helgi Justinussen 3, Ragnar Stakksund 2, Ræni Slættanes 2, Dann Thorleifsson 2, Helgi Michelsen 1
Brotskøst: StÍF 3, Neistin 5
Útvísingar: StÍF 5, Neistin 3
Dómarar úr Tjaldri: Trygvi Mortensen & Kári Hansen

StÍF-Neistin 25-17 (15-9):

# StÍF bjóðar av

**Kvinnurnar av Strondum hava við tveimum sigrum á rað nú veruliga staðfest seg sum avbjóðarar í heiðursmerkjastríðnum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað fór mest sum ein ylur gjøgnum føroyska hondbóltsheimin, tá StÍF fyri góðari viku síðani vann á StÍF. Mest av øllum líktist hetta eini sensatión, men mikukvøldið prógvaði StÍF, at tann sigurin als ikki kom av tilvild.

Neistin fekk nevnliga ikki eitt bein at jørðini, tá tær vitjaðu á Skála. Eftir einum lítilum korterið var munurin longu seks mál, og tað eydnaðist ongan tíð teimum bláu at koma í nær námind av at skapa spenning íaftur.

Tað var serliga í verjupartinum og so í skjótálopum, at StÍF vissaði sær sigurin, tá Neistaverjan ferð eftir ferð var um ein háls av longu útkøstunum og kviku vongspælarunum hjá StÍF. At gestirnir heldur ikki megnaðu at fáa nakra serliga ferð á spælið gjørdi heldur ikki uppgávuna hjá StÍF alt ov trupla, og við bert einum veruligum skjútta á liðnum var hóttanin útifrá eisini ov lítil til veruliga at ræða StÍF, sum stútt og støðugt koyrdi sigurin heim seinastu trý korterini eftir ógvusligu byrjanina.

### Toppdystur í Vági

Soleiðis er nú lagt upp til oddadyst, tá StÍF um vikuskiftið vitjar í Vági. Ein støða, sum fáur mundi ímynda sær, tá kappingarárið byrjaði, men tað er kortini ein støða, sum nú er veruleiki.

Og sum StÍF hevur spælt seinnu dystirnar, so eru tær eisini helst tað liðið, sum kann geva VB harðastu mótstøðuna. Eitt er, at liðið hevur tríggjar góðar útlendskar leikarar, men við góðu úrslitunum kemur sjálvsálitið av sær sjálvum yvir á lokalu leikararnar, og nú hesar eisini hava eitt ára royndir í bestu røðini, eru tær munandi betri førar fyri at seta seg ígjøgnum, og tað er eisini tað, sum tær nú eru í ferð við at gera.

Neistin tykist hinvegin muga ásanna, at í løtuni er liðið kanska ikki betri enn til eitt pláss miðskeiðis í røðini. Breiddin í hópinum er ikki hin sama, sum hon onkun tíð hevur verið, og eitt nú merktist tað væl hesaferð, at Súna Mørk er burturstødd. Tað er hon eisini til komandi dystin, tá Neistin vitjar Tjaldur, og hetta líkist í løtuni vera ein lykladystur fyri bæði liðini. Ein dystur, sum í stóran mun fer at gera av, hvørt liðini skulu vera við í heiðursmerkjapuljuni, tá farið verður undir endaspælið.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Neistin 25-17 (15-9)**

Málskjúttar:
StÍF: Asta Petrauskiene 10(3), Alina Olaru 6, Poula D. Olsen 4, Anna B. Danielsen 4, Anna Maria Berthelsen 1
Neistin: Simona Dziugyte 8(3), Rakul Augustinussen 4, Susan Brockie 2, Lív Sørensen 2(1), Mildrið Jacobsen 1
Brotskøst: StÍF 4, Neistin 5
Útvísingar: StÍF 2
Dómarar úr Tjaldri: Trygvi Mortensen & Kári Hansen.